

## Bispur prædikar í Sámalskirkjuni

Komandi sunnudag klokkan 14 fer Jógvan Fríðriksson, bispur, at prædika í Sámalskirkjuni í Keypmannahavn.

Og sama dag klokkan 17:30 verður hugnaløtan í Føroyahúsinum á Vesterbrogade 17.

Til matna verður ræst kjøt, kaffi og dessert.

Stanley Samuelsen fer at undirhalda við sangi og hjálpir eisini við sangi úr Føroya Fólks. Heini Davidsen fer at siga eina søgu, siga tey úr Sámalskirkjuni.




*Tórshavnar Býráð hevur samtykt, at rundkoyringin á Argjahamri skal gerast liðug, áðrenn farið verður í skúlan eftir summarfrítíðina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Rundkoyring á Argjahamri

**BÝRÁÐ Tórshavnar Býráð hevur samtykt, at rundkoyringin við nýggja skúlan á Argjahamri skal gerast liðug, áðrenn farið verður í skúlan**

Eirikur Lindenskov

Á seinasta býráðsfundi játtaði býráðið 2,5 milliónir krónur til endamálið.

Avrátt er, at vegaatkoman til skúlan skal verða úr rundkoyringini. Peningurin, sum nú er játtaður, er av játtanini til skúlabygginginga, sum nú nærkast endanum, sigur Jógvan Arge formaður í mentamálanevndini.

Skúlin verður latin kommununi í vár og í summar, og skúlagongdin byrjar eftir summarfrítíðina. Tað er byggifelagið Articon, sum stendur fyri at byggja Skúlan á Argjahamri. Farið varð undir arbeiðið á sumri 2009, og tað hevur gingið væl.

Býráðið hevur játtað góðar 500.000 krónur til nýggjar startskamlar í Svimjihøllini í Gundadali. Hendan nýggja útgerðin hevur eisini í sær fyrsta floks útbúnað til tíðtøku, tá svimjikappingar eru.

Hetta kemur væl við hjá Havnar Svimjifelag og teimum, sum annars luttaka í svimjikappingum í 25 metra hylinum í Svimjihøllini í Gundadali, sigur Jógvan Arge.

Býráðið hevur eisini játtað eina góða millión krónur til umvæling og dagføringar í lon 2 á Venjingarskúlanum. Tá arbeiðið er liðugt, eru hølini til alis- og evnafrøði dagførd. Har verður eisini eitt nýtt høli til fyrilestrar.

Føroya Læraraskúli og Venjingarskúlin eru ein samogn. Felagsútreiðslurnar verða býttar millum Lærarskúlan og Venjingarskúlan í lutfallinum 60/40.

Kommunurnar partur av umvælingini, sum nú verður gjørd, er 40 prosent. Arbeiðið verður mett til 2,6 mió kr. Parturin hjá Tórshavnar kommunu er 1.034.000 pluss 64.000 krónur í mvg, sigur formaðurin í mentamálanevndini Jógvan Arge.

# Okkara Páskir eru um várið




– Tá várið ikki kemur við betri veðri, so kunnu vit fegnast um, at tað, ið hvussu er hevur nógvar spennandi páskaøl við sær, sigur Okkara í tíðinaskrivi.

Í Danmark og Føroyum hevur í mong ár verið siður, at bryggjaríini lata síni páskabryggj á marknaðin fýra vikur fyri páskir. Í ár var hesin sonevndi p-dagurin síðsta fríggjadag. Og tá fingu føroyingar høvi at royna eina heilt nýggja páskaøl, nevniliga Okkara Páskir frá bryggjarínum á Velbastað.

Bryggjararnir á Velbastað hava lagt nógva orku í at menna Okkara Páskir og at skapa eina spennandi og samstundis leskiliga og væl smakkandi øl. Tí er nýtt dupult av øllum: Tvær humlur, tvey sløg av malti, tvær gerir og tvey ymisk bryggj, eitt undirgerað og eitt yvirgerað, sum síðani eru lagraði saman.

Úrslitið er sambært bryggjarínum ein ravlitað og lætt drukkin øl. Tann væl vigaða javnvágin millum úrvalsgeriørnar og tvinnu sløgini av malti og humlu geva Okkara Páskum ein leskiligan smakk, ið ger ølina væl egnaða aftur við øllum føroyskum mati.

Sniðið á fløskuetikettini og dósini ímynda vársins gulu og grønu litir.

## Fyrilestur um blámusopp

Fyrilestur um blámusopp í Miðlahúsinum

Í kvøld kl 19.30 skipar Føroya Astma/Allergifelag fyri fyrilestri um trupulleikar við blámusoppi. Fyrilesturin verður í Midlahúsinum í Havn. Lone Grønborg, lívfrøðingur, heldur fyrilesturin. Fyrilesturin fer at viðgera og umrøða evnini:

- Hvat er blámusoppur?
- Hvussu kemur blámusoppur inn?

Og um nýggj materialir í Føroyum, sum kann hjálpa einum til at verja seg við ímóti blámusoppi. Fyrilesturin um blámusopp er almennur og øll áhugað eru vælkommin. Blámusoppur og inniluft eru evni, ið eru vorðin alt




*Húkamálið er nú endað aftur á borðinum hjá Anniku Olsení Innlendismálaráðnum*

# Húkurin aftur í landsstýrinum

**HÚKUR Innlendismálaráðið skal nú taka støðu til, um húkurin í Klaksvík skal takast niður aftur ella ei**

Randi Jacobsen

Framtíðin hjá stóra húkinum, sum síðan august hevur staðið í rundkoyringini við tunnilsvegin í Klaksvík, er framvegis ógreið.

Landsverk vildi hava húkin burtur, men Klaksvíkar kommuna kærdi ta avgerðina til Vinnukærunevndina. Vinnukærunevndin hevur leingi havt málið á sínum borði, men nú hevur hon víst málið frá sær.

Málið er tí farið aftur í Innlendismálaráðið, sum í fjør gav fyribilsloyvi til at hava húkin standandi.

Rúni Joensen, aðalstjóri í Innlendismálaráðnum, sigur, at nú fara tey at viðgera málið eina ferð enn. Hann fæst kki at siga, m hann heldur, at húkurin skal takast niður ella ikki.

Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík veit ikki, hvat hon skal siga um málið, sum fyllir stórar dungar av pappíri.

Grundgevingin fyri kravinum um at taka húkin niður var ferðslutrygdin.

- Húkurin stendur har, og ikki eitt einasta óhapp hevur verið í rundkoyringini, síðan húkurin kom, sigur Gunvá við Keldu.